Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Veðurfrøði á flogvøllinum

Spurningar:

1. Er tað nøktandi, at altjóða flogvøllur sum Vága Floghavn, onga lokala veðurfrøði hevur?
2. Nær verður ein partur av Veðurstovu Føroya flutt vestur á flogvøllin?
3. Tekur landsstýrimaðurin undir við, at almenn arbeiðspláss verða kjølfest runt alt landið, har tað gevur meining?
4. Hevur landsstýrimaðurin heimild at staðseta veðurfrøðina á Flogvøllinum?

Viðmerkingar:
Hyggja vit vestur í Vágar og at økinum runt flogvøllin, síggja vit, at har er ein stór broyting og menning. Komuhøllin verður útbygd, parkeringsøkið verður víðkað, hangarur skal byggjast, hotellið verður útbygt, flúgvisimulator verður bygdur. Umframt hetta eru ætlanir um enn fleiri útbyggingar við stuðli úr m.a. Íleggingargrunninum.

Hetta er sera gleðiligt og neyðugt, tá hugsað verður um, hvussu ferðafólkatalið veksur ár fyri ár.

Tí er eisini neyðugt, at tilbúgvingin og veðurfrøðin er nøktandi í mun til, at Vága Floghavn er ein altjóða flogvøllur.

Tað, at ein samlað Veðurstova Føroya varð kjølfest í Tórshavn, var ein fyribilsloysn.

Fyri at fáa at vita, nær lokal føroysk veðurfrøði verður kjølfest á flogvøllinum, verður hesin spuringur settur.

Á Løgtingi, 6. desember 2023

Jóhannis Joensen